Álit

í

løgtingsmáli nr. 12/2025: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fyrsta byggistig at høvuðsumvæla og umbyggja skúlabygningarnar á Frælsinum (Prosjektera næsta byggistig fram til útboð)

Landsstýrismaðurin í barna- og útbúgvingarmálum, Djóni Nolsøe Joensen, hevur lagt málið fram 23. september 2025, og eftir 1. viðgerð 30. september 2025 er tað beint Fíggjarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 23. oktober 2025.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við landsstýrismannin í barna- og útbúgvingarmálum, Djóna Nolsøe Joensen, saman við Landsverki og Fróðskaparsetrinum.

Málið snýr seg um at gera broyting í løgtingslóg nr. 83 frá 22. juni 2023 um at høvuðsumvæla og umbyggja skúlabygningarnar á Frælsinum, og í henni at geva heimild til eisini at halda útreiðslur til víðari at prosjektera næsta byggistig í skúlabygningunum á Frælsinum fram til útboð fyri í mesta lagi 14,5 mió. kr.

Í viðmerkingunum til uppskotið verður greitt frá, at vinnandi arkitektarnir hava ment heildarætlan fyri høvuðsumvælingina og uppíbyggingina saman við Fróðskaparsetrinum og Landsverki, og at hetta arbeiði við prosjektering fram til skipanaruppskot væntast at verða liðugt um miðjan november 2025. Til hetta arbeiðið játtaði Løgtingið hin 10. apríl í ár materiella heimild at brúka 7,3 mió. kr.

Undir viðgerðini av málinum er nevndin blivin kunnað um, at hesar ætlanir verða mettar at halda, og at tá skipanaruppskotið nú verður klárt um fáar vikur, og um Løgtingið gevur heimild til at nýta upp til 14,5 mió til at prosjektera næsta byggistig, so verður eftir ætlan farið í holt við tað beinanvegin, so at næsta byggistig er klárt at bjóða út á sumri 2026. Næsta byggistig fevnir um at høvuðsumvæla og umbyggja lon 2, lon 3 og lon 4 eins og samanbygging millum lonirnar. Og talan er um umleið 2.100 m^2 av høvuðsumvæling og 1.000 m^2 av afturatbygging.

Mett verður eisini, at tøka játtanin í 2026 sambært fíggjarlógaruppskotinum, sum er til viðgerðar, er nøktandi til ráðlagda virksemið í tí fíggjarárinum.

Upplýst er fyri nevndini, at verklagslógin til at byggja næsta byggistig kemur fyri Løgtingið, tá tikið er av vinnandi tilboði, væntandi í august. Ætlandi skal tann verklagslógin eisini innihalda heimild til at prosjektera víðari byggistig. Tá hesi síðani eru prosjekterað fram til útboð, verður væntandi nýggj verklagslóg fyri 3. byggistig løgd fyri Løgtingið.

Undir viðgerðini er komið fram, at lon 5 nú er tikin í nýtslu; okkurt smávegis vantar í at fáa hana heilt lidna. Semja var millum hoyringarpartarnar um, at tað var rætt at gera eina lon fyrst fyri at fyrireika samlaðu høvuðsumvælingina og uppíbyggingina væl.

Undir viðgerðini er eisini komið fram, at Fróðskaparsetrið fer at flyta virksemið, sum heldur til á 2. hædd í Sjóvinnuhúsinum (partar av virkseminum hjá Náttúruvísindadeildini) inn í Nóatún, í lon 3 á Frælsinum 20 og í sokallaðu íbúðirnar, nú Tórshavnar Kommuna skal nýta hølini. Flutt verður í november. Harumframt skal kommunan nú eisini nýta ein part av 4. hædd í Sjóvinnuhúsinum, sum Setrið leigar. Alt hetta gevur eina ávísa sparing í leigukostnaði, men krevur samstundis, at Setrið yvir raksturin má fíggja eina ávísa tillaging av egnum hølum uppi á Frælsinum til hesar ymsu útbúgvingar, sum flyta niðan.

Nevndin er eisini kunnað um, at so hvørt sum umvælt og umbygt verður, so er ætlanin at arbeiða við einari til tveimum lonum í senn, og tað vil siga, at virksemið á Frælsinum í tíðarbilum má flytast undan og vera eina til tvær lonir fyriuttan í senn, inntil alt arbeiðið eftir heildarætlanini at høvuðsumvæla 7.000 m^2 og byggja afturat 3.500 m^2 til at hýsa trimum deildum hjá Setrinum, er framt. Allar slíkar tillagingar verða ráðlagdar í samráði við Fróðskaparsetur Føroya.

Nevndin er samd um, at tað er av alstórum týdningi, at arbeiðið við at seta skúlabygningarnar á Frælsinum í góðan stand til dagsins og framtíðar tørv hjá Fróðskaparsetri Føroya má halda fram.

Við hesum viðmerkingum tekur ein samd nevnd undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Fíggjarnevndin, 30. oktober 2025

Eyðgunn Samuelsen forkvinna	Beinir Johannesen næstformaður	Bjarni Hammer
Dennis Holm	Hanna Jensen	Magnus Rasmussen
	Rósa Tyril Gardlykke	